# TÍÐINDI

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

Fyritíðarpensjonistar:

# Hava ikki nøktandi kor

**Tá tað kemur til livikorini hjá fyritíðarpensjónistum, eru Føroyar eftirbátur. Tey, ið hava stóra og sterka familju, sum kann taka sær av teimum, eru betri fyri. Samfelagið loftar ikki hesum samfelagsbólki. Tað vísir nýggja og umfatandi kanningin, sum granskingardepilin hevur gjørt fyri MBF**

KANNING
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Í Føroyum hava vit nú metlágt arbeiðsloysi. Sagt verður, at vit troyta alla arbeiðsmegi, og at vit allarhelst verða noydd at innflyta arbeiðsmegi, fyri at knógva.

Men kring landið sita 8% av føroyingum, sum ikki verða tiknir við í arbeiðsloysismetingini. Summir av hesum føroyingum hava 50% av arbeiðsorku, aðrir hava 25%. Og felags fyri hesar føroyingar er, at teir fegnir vilja sleppa út á arbeiðsmarknaðin aftur.

Trupulleikin er, at teir eru fyritíðarpensjónistar. Tað eru fólk í øllum aldri, við alsyns útbúgvingum og við ymiskum brekum og sjúkum, sum gera, at teir ikki fáa arbeitt. T.d. eru tey rørðslubrekað, blind ella deyv, og sálarliga- ella likamliga sjúk.

## Familjan tekur um endan

Nýggja kanningin vísir greitt, at vælferðin, sum okkum dámar so væl at prýða okkum við, ikki røkkur til øll í samfelagnum. Hóast livikorini áttu at verið tey somu fyri allar borgarar, so vísir veruleikin nakað annað.

Teir fyritíðarpensjónistar, ið hava góða familju, ið hevur orku og umstøður at taka sær av teimum, eru betri fyri enn teir, ið ikki hava familjuna at dúva uppá. Samfelagið dugir sostatt ikki nóg væl at lofta hesum samfelagsbólki, sum telur heili 8% av fólkatalinum.

Tey, ið koma út fyri óhappi ella gerast sjúk, og frá degi til dags gerast fyritíðarpensjónistar, fáa alt ov lítla hjálp. Í fyrsta lagið fáa flestu teirra ov lítla uppvenjing og hjálp annars frá sjúkrahúsverkinum. Í øðrum lagi verða tey alt ov illa kunnað um møguleikar og rættindi. Tey mugu sjálvi leita sær upplýsingar og kunnandi tilfar um ymsu stovnarnar, ið tey nú brádliga eru bundin at, t.d. Almannastovuna, Hjálpartólamiðstøðina og Nærverkið. Tað er tungt at venja seg við at liva við nýggja brekinum og brádliga at vera brúkari ístaðin fyri at vera borgari. Hetta, at tey sjálvi skulu leita sær upplýsingar um rættindi, ger, at nógv teirra ikki troyta teir møguleikar, ið eru. Tey hoyra ongantíð um møguleikarnar.

Samskiftið ímillum ymsu stovnarnar er somuleiðis alt ov vánaligt. Tí fellir tað eisini tí brekaða í lut at vera bindilið ímillum teir almennu stovnar, ið hann er bundin at. Eisini hetta kann vera ein sera møtimikil uppgáva.

Peningaliga hjálpin, sum tey hvønn mánað fáa frá Almannastovuni, er ikki nóg høg til, at tey klára seg einsamøll. Fleiri noyðast tí at búgva inni hjá foreldrum ella aðrari familju. Hetta, at verða bundin av familjuni og ikki kunna klára seg sjálvan, ger, at fleiri teirra hava lágt sjálvsvirði og kenna, at tey útnytta familjuna. Tey kenna seg troytt og útbrend, og av tí sama hava tey lítið sosialt lív. Tey koma inn í eina ónda ringrás.

Hóast tey vilja, so er sera torført hjá teimum at fáa arbeiði, ið er hóskandi til teirra skerda arbeiðsførleika. Ymsir trupulleikar kunnu vera, t.d siga summir arbeiðsgevarar seg ikki kunna taka ábyrgdina av, at hava ein fyritíðarpensjonist í arbeiði. Ein onnur orsøk er atkomutrupulleikar. Lønar- og setanarviðurskifti hava eisini ein týðandi leiklut, tí tey vilja ikki bert hava eitt arbeiði fyri ein og hvønn prís. Fleiri teirra hava góðar útbúgvingar, sum tey frá degi til dags ikki kunnu nýta longur. Arbeiðið skal vera virðiligt og geva meining.

Tað, at familjan spælir ein so týðandi leiklut í lívsgóðskuni hjá fyritíðarpensjónistunum, er ein greið ábending um, at tey verða slept uppá fjall av tí almenna.



*Á tíðindafundi í morgun var kanningarúrslitið lagt fram. Niðurstøðan var greið: fyritíðarpensjónistar í Føroyum hava ikki nøktandi kor*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Føroysk eyðkenni

Hóast fyritíðarpensjónistarnir eru ein rættiliga stórur samfelagsbólkur, so er hetta samstundir ein sera friðaligur bólkur, ið ikki rópar hart um vantandi rættindi og keðilig livikor.

Hugburðurin í Føroyum tykist vera tann, at tað er skomm ikki at arbeiða. Tí tosa flestu fyritíðarpensjónistar øgvuliga spakuliga um, at tey ikki arbeiða.

Arbeiðið er seinastu árini vorðin alsamt størri partur av samleikanum hjá fólki, og ikki at hava arbeiði, er sum at mangla ein part av samleikanum. Kanningin vísti, at fleiri teirra hugsa at, “Eg havi einki arbeiði og tí eri eg einki”.

Eitt annað føroyskt eyðkenni er tað, at man grenjar ikki. So hóast tey ikki fáa nóg mikið av peningi til at klára seg sjálvi, hóast flestu almennir bygningar hava trappur og eru illa atkomiligir hjá fólki við breki, hóast eingir bústaðir eru til hendan bólk við serligum tørvi og hóast lítið og einki verður gjørt fyri at fáa tey út á arbeiðsmarknaðin aftur, so siga tey einki. Tí tey vilja ikki grenja.

Av tí sama eru flestu fólk ikki greið um støddina og álvarsemi á trupulleikunum hjá føroysku fyritíðarpensj onistunum.

## Hvat kann gerast

Mbf og granskingardepilin vísa í arbeiðsritinum á nógvar konkretar loysnir.

Mánaðarliga gjaldið frá Almannastovuni má hækkast, soleiðis, at stakir fyritíðarpensjónistar kunnu klára seg sjálvir. Samanbera vit kostnaðarstøðið, sum er í samfelagnum við gjaldið, tey fáa frá Almannastovuni, er í summum førum talan um fátækradømi.

Tey, sum búgva í egnum húsum mugu fáa betri fíggjarliga hjálp til viðlíkahald av húsi og ogn. Harafturat mugu fleiri bústaðartilboð gerast til fólk við skerdum førleika.

Sum er, er ein av avleiðingunum av at gerast fyritíðarpensjonistur, at tú mást taka teg av arbeiðsmarknaðinum. Mannagongdir mugu gerast, soleiðis, at tað framhaldandi verður møguligt at hava eitt tilknýti til arbeiðsmarknaðin, hóast arbeiðsorkan er skerd. Tað almenna eigur at ganga á odda við hesum broytingum. Eisini kunnu fakfeløgini gera mannagongdir, sum tryggja limunum betri kor, tá teir gerast fyritíðarpensjónistar.

Samfelagið eigur eisini at taka ábyrgdina frá familjuni. Samfelagið svevur í so máta, tí familjan tekur um endan, tá á stendur. Hetta er ikki nøktandi.

Familjan at vera viðurkend fyri tað arbeiði, ið hon ger og eigur at fáa tilboð, sum kunnu lætta um.




Tú ert við at keypa inn, selja, vegleiða og ráðgeva kundum okkara. Tú sleppur at royna teg í bæði pappírs- og í bókadeildini, ella kanst tú velja aðra sum sergrein.

Í lærutíðini verður tú eisini send/ur til Danmarkar á skeið.

Tú mást hava FHS/HH ella studentsprógv. Lærutíðin er 2 ella 3 ár, alt eftir hvørja skúlagongd tú hevur.

Løn og setanartreytir eru sambært galdandi lærusáttmála.

Er hetta nakað fyri teg, so send eina umsókn til: kari@ritograk.fo, ella send hana til Rit & Rák, postboks 1158, 110 Tórshavn.

Umsóknarfreistin er 24. september.

Rit og rák, størsti bókahandil í landinum, er eitt spennandi arbeiðspláss.

Vit selja bøkur, skrivstovulutir og aðrar smálutir til fólk flest, til vinnulívið og til skúlarnar.

**Góð tænasta er okkara mál!**

Rit&Rák

sms • postboks 1158 • FO 110 Tórshavn • tel 603030 • ritograk@ritograk.fo • ritograk.fo